# COURTNEY LOVE SAMSTARVAR VIÐ MOBY

Kurt Cobain einkjan og fyrrverandi Hole songkvinnan Courthey Love fer í næstum í upptøkuhølið saman við elektroniska tónleika gandakallinum Moby. Love sum seinastu árini hevur spælt undir egnum navni, sigur við bretska blaðið The Sun, at hon og Moby hava sett sjey dagar av í sínum kalendara, fýra dagar til venjing og tríggjar til upptøkur. Allar upptøkurnar vera gjørdar sera lo-fi, við ongum Protools ella øðrum talgildum upptøkutølum. Courtney Love sigur sjálv, at hon og Moby eru sera væl, og plaga at síggjast javnan. Hann fær meg, at kenna meg so tryggan sigur Love. Væntandi verður hetta partur av nýggju fløguni hjá Courtney Love, ið eisini hevur arbeitt saman við Alice In Chains gittarleikaranum Jerry Cantrell, Smashing Pumpkins oddamanninum Billy Corgan og fleiri ymiskum bretskum Indie bólkum í sambandi við hesa útgávu. Fløgan er fyrsta útgáva hjá Courtney Love síðan risa hittið America's Sweetheart, ið kom út í 2004.




*Eitt sera ósannlíkt par villa Courtney Love og dámligi Moby samstarvar í upptøkuhølinum*
*(scanpix.dk)*

## HITLIST

### 15 tær bestu

ÚF

| | | |
|---|---|---|
| 1 | The Story Ends | Dancing Around Honululu |
| 2 | Red Hot Chili Peppers | Dani California |
| 3 | Høgni Lisberg | Just Dig |
| 4 | Wyclef Jean & Shakira | Hips Don't Lie |
| 5 | Black Eyed Peas | Pump it |
| 6 | The Pussycat Dolls | Beep |
| 7 | Mary J Blige & U2 | One |
| 8 | The Rasmus | Sail Away |
| 9 | Rihanna | S.O.S. (Rescue Me) |
| 10 | Kent | Dom som försvann |
| 11 | Pink | Stupid Girls |
| 12 | Rókur | Backyard Traffic |
| 13 | Gavin Degraw | Just Friends |
| 14 | Eminem ft. Nate Dogg | Shake That |
| 15 | Poppkorn | Droymi Mitt Um Dagin |

DR

### Tjeklisten

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Rasmus Nøhr | Sommer I Europa |
| 2 | Red Hot Chili Peppers | Dani California |
| 3 | Mew | Why Are You Looking Grave |
| 4 | Carpark North | The Beasts |
| 5 | Tina Dickow | Warm Sand |
| 6 | Spleen United | Spleen United |
| 7 | TV-2 | Sporløs |
| 8 | Infernal | Ten Miles |
| 9 | The Raveonettes | Uncertain Times |
| 10 | Morrissey | You Have Killed Me |
| 11 | Belle And Sebastian | The Blues Are Still Blue |
| 12 | Bryan Rice | Homeless Heart |
| 13 | Peter Sommer | Man hamrer løs på åben en dør |
| 14 | Flaming Lips | The Yeah Yeah Yeah Song |
| 15 | Magtens Korridorer | Nordhavn Station |
| 16 | The Streets | When You Wasn't Famous |
| 17 | Jokeren ft. Mass | Godt Taget |
| 18 | Laleh | Live Tormorrow |
| 19 | Mary J Blige & U2 | One |
| 20 | Lupus | You Don't Dance |

BBC

### Top of the Pops

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Gnarls Barkley | Grazy |
| 2 | Red Hot Chili Peppers | Dani California |
| 3 | Beatfreakz | Somebody's Watchin Me |
| 4 | Infernal | From Paris To Berlin |
| 5 | Rihanna | S.O.S. (Rescue Me) |
| 6 | The Raconteurs | Steady As She Goes |
| 7 | Chicane ft. Tom Jones | Stoned In Love |
| 8 | Dirty Pretty Things | Bang Bang You're Dead |
| 9 | Shayne Ward | No Promises |
| 10 | Snow Patrol | You're All I Have |
| 11 | The Kooks | Naive |
| 12 | Feeder | Lost And Found |
| 13 | Mary J Blige & U2 | One |
| 14 | Will Young | Who Am I |
| 15 | LL Cool J ft J-Lo | Control Myself |
| 16 | Chris Brown | Yo (Excuse Me Miss) |
| 17 | Orson | No Tomorrow |
| 18 | Fall Out Boy | Dance Dance |
| 19 | Black Eyed Peas | Pump It |
| 20 | Ne-Yo | So Sick |

Billboard

### Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Rihanna | S.O.S. (Rescue Me) |
| 2 | Daniel Powter | Bad Day |
| 3 | Sean Paul | Temperature |
| 4 | Chamillionaire ft. Krayzie Bone | Ridin' |
| 5 | T.I. | What You Know |
| 6 | Nick Lachey | What's Left Of Me |
| 7 | Bubba Sparxxx og onnur | Ms. New Booty |
| 8 | Natasha Bedingfield | Unwritten |
| 9 | Red Hot Chili Peppers | Dani California |
| 10 | James Blunt | You're Beautiful |
| 11 | Dem Franchize Boys og onnur | Lean Wit It, Rock Wit it |
| 12 | Fort Minor ft. Holly Brook | Where'd You Go |
| 13 | Mary J. Blige | Be Without You |
| 14 | Kelly Clarkson | Walk Away |
| 15 | The Fray | Over My Head (Cable Car) |
| 16 | Rascal Flatts | What Hurts The Most |
| 17 | The All-American Rejects | Move Along |
| 18 | Ne-Yo | When You're Mad |
| 19 | Shakira ft. Wyclef Jean | Hips Don't Lie |
| 20 | Cascada | Everytime We Touch |

sound

# PET SHOP BOYS BÓÐU UM AUTOGRAF

Danski poppbólkurin Infernal hevur seinastu vikurnar fingið sítt gjøgnumbrot í Onglandi, lagið From Paris To Berlin liggur á fjórða plássi á Top Of The Pops. Infernal spældi tí live í sendingini hetta vikuskiftið. Hetta er ein risa møguleiki hjá bólkinum, ið hevur droymt um altjóða gjøgnumbrot í nógv ár. Top Of The Pops er ein nógv eftirhugd sending, og hevur lagt pall til nógvar kendar bólkar gjøgnum tíðirnar.
Hóast hetta var ein stórsligin uppliving fyri bólkin, var tað tó ein onnur uppliving, ið veruliga tók Infernal av bóli. Við danska blaðið BT sigur mannliga helvtin av duo'ini, Paw Lagerman, at meðan tey vóru handan pallin á Top Of The Pops, kom ein umboðsmaður hjá teimum aftur um pallin, við tveimum fløgum at skriva autograf á.



Fløgurnar vóru til báðar limirnar í Pet Shop Boys, ið bóðu heilsa, at teir vóru Infernal fjepparar.

# MARIA GUTTESEN VIÐ NÝGGJARI FLØGU



*Maria Guttesen stendur aftur á egnum beinum á eini útgávu.*

19. mai gevur Maria Guttesen nýggja fløgu út, og letur upp nýggja heimasíðu á www.mariaguttesen.dk. Fløgan er tikin upp á tveimum konsertum í Salon í Århus her fyri.
Maria hevur gjørt flestu løgini sjálv. Lene Drachmann hevur sett orð til flestu løgini, Maria Salomon hevur sett orð til tvey og føroyska Elspa Metzdorff hevur sett orð til eitt lag.
Maria hevur tónleikagestir við á upptøkunum. Tey eru føroyska Lena Anderssen, ið syngur og danin Morten Svenstrup, ið spælir cello, umframt Sophie Ziedoy sum verður kórsangari. Maria sang sjálv og spældi klaver. Hetta er fyrsta soloútgáva hjá Mariu í nógv ár.

# MR. T – TANN NÝGGI DR. PHIL

Amerikanska sjónvarpsrásin The TV Land fer í næstum undir eina sendirøð, ið tey kalla "I Pity The Fool", har verturin er MR. T, ið er kendur úr Rocky II og úr sjónvarpsrøðini The A-Team.
Í nýggju sendirøðini ferðast MR. T kring USA, og tosar við fólk. Hann gevur teimum, ið hava persónligar ella yrkisligar trupuleikar góð ráð, og sigur við AP tíðindastovuna, at tey eru býtt, um tey ikki lurta eftir honum. Hann sigur somuleiðis, at her er ikki talan um eitt nýtt Dr. Phil show, har fólk sita og gráta. Í sambandi við sendirøðina, hevur MR. T eisini úttala seg um, at T'ið í navninum stendur fyri talk(prát).



*Mr. T ferðast kring USA við góðum ráðu,*